# SALTSILOA




**Seinastu tvey vikuskiftini hava sangkórið í Siloa og sangbólkurin SALT havt konsertir. Ein var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, hin í Norðurlandahúsinum**



UMMÆLI
*Hanna Jensen*

Siloakórið hevur nógv ár á baki, eini 15 ár, og tað er Eyðun á Lakjuni, sum hevur útbúgving frá konservatoriumi, sum stjórnar. Tey telja uml. 35 fólk harav ein góður triðingur eru menn. Fyrr vóru tey flestu fuglfirðingar, men fleiri og fleiri eru komin afturat úr ymsum bygdum í Eysturoynni. Skarin er lutfalsliga ungur, men tey tilkomnu smæðast ikki burtur, og tey sýnast samansjóðað og glað fyri tað tey gera. Kórið er farið ígjøgnum eina líðandi menning frá tí hevdvunna føroyska kórstílinum (við teimum eyðkennum og tí tilfarsúrvali, sum hava gjørt seg galdandi fyri kór við tilknýti til brøðrasamkomuna) til eitt meiri modernað kór, sum eisini umfatar gospelkórstílin og annan rútmiskan kórsang. Men eg vil siga, at tey hava dugað væl, at hava tað gamla við. Og úrvalið skiftir nakað, alt eftir hvat høvið er. Kórið syngur til vanligar og serstakar kristiligar samkomur, men eisini onnur tiltøk sum konsertir heima í Føroyum og uttanlands.

Soleiðis var skráin samansett av Kingosálminum *Nú rennur sólin fríð*, sum Chr. Matras hevur umsett, við gomlum, føroyskum sálmalagi, sum Kári Bæk hevur sett út til kór. Við fleiri kendum gospelslagarum, sum *Soon and Very Soon, I don´t know why Jesus loved me* og *I´m gonna keep on singing*, og eisini øðrum tilfari hjá Andrae Chrouch, sum *Sweet Jesus*. Fleiri løg komu frá Oslo Gospel Choir, sum er eitt sera vælumtókt "hvítt" gospelkór, og ávirkanin frá hesum kóri sæst týðiliga, og tað nevndu tey eisini sjálv. Tore W. Aas er tann, sum ger stóran part av tilfarinum hjá OGC. Eyðun Jacobsen átti lagið *Harri av hjarta..*

Samanumtikið var tað eitt væl upplagt og væl fyrireikað kór, sum vit upplivdu til báðar konsertirnar. Sangurin var sera góður og vakur. Kórið er væl trenað. Tey eru so kontrollerað og avbalanserað, og fara frá tí inniliga og stilla til ta brúsandi og næstan ógvusliga. Mansrøddirnar eru óvanliga góðar, og nógvir góðir solosangarar trívast har. Skjótt er at gloyma onkran, men Elisabeth Hansen, Elsebeth Lassaberg og Bárður á Lakjuni syngja nógv og sera væl. Onnur eru Karolina Højgaard, sum hevur eina fantastiska kraft í síni rødd, sum eisini er nokkso serstøk, og sum bergtekur meg hvørjaferð eg hoyri hana. Og ein onnur, eg skal taka fram, er Erla á Torkilsheyggi, sum júst er byrjað at syngja solo. Hon hevur eina spaka, yndisliga rødd, sum egnaði seg væl til teir sangir hon sang, ein glaður sangur við latínskum rútmum: *Joy to My Soul,* og ein friðarligur hjá Åge Samuelson, sum Svenning av Lofti hevur umsett: Á *Jesus tú mín frelsari,* sum var eymliga framførdur við violin og spøkum kóri aftanfyri.

Hetta leiðir meg til at nevna tað innihaldsliga, sum á ongan hátt er farið afturum tað tónlistarliga. Eg haldi, at eg kann siga, at vit fingu ein sterkan boðskap um trygd og lyfti Harrans. Kingosálmurin endar */Lat Gud bert ráða/.* Og aðrastaðni sungu tey*/Tú heldur lyftini, sum tú lovaði../* og /*Hvar leiðin enn ber er so trygt, tí Tú ert mær við lið/*. Og sum heild var tað eitt lovsyngjandi kór vit hoyrdu, sum skapti eina atmosferu av ærufrykt. Pláss var tó eisini fyri skemti, og hereftir eitur Andrae Crouch nokk bara Andreas í Króki - hitt er altíð so ringt at fáa rætt!

Tað eg havi nevnt um rútmur og tílíkt hevði ikki verið møguligt uttan teir góðu tónleikarar, kórið hevði við sær. Dánjal Zachariassen spældi trummur, Svend Åge Drewsen bass, Gunnar Guttesen spældi ljómborð og Pætur Dahl Christiansen spældi guitar. Fleiri ferðir gleddi Gunnar áhoyrarafjøldina við sínum solospæli, og allir settu teir dám á við onkrum serligum. Eg havi hug at nevna trummuspælið í Sweet Jesus, ta vøkru guitarsolona og tað altíð trivaliga og rimmarfasta bassspælið.

Eg kann ikki siga annað, enn at tað stendur í blóma í Fuglafirði, og stuttligt var at síggja landstýrismannin í mentamálum standa á sínum fasta plássi og "praktisera".

Sangbólkurin SALT trein á pallin, eftir at Siloakórið hevði sungið helvtina av sínum tilfari. Konsertin var skipað við steðgi, tá hon var hálvrunnin, og SALT sang beint áðrenn og beint eftir steðgin.

SALT eru sjey fólk ymsastaðni úr Eysturoynni, tey hava fýra kvinnurøddir og tríggjar mansrøddir. Fyrsta inntrykk er, at tey eru skipað í tríggjar bólkar, har systrarnar Elsebeth Lassaberg og Eydna Jacobsen eru ein, teir ungu menninir, Bárður á Lakjuni, Jóan Magnus Kristiansen og Óli Christian á Torkilsheyggi eru ein og at enda Paula Jacobs og Arnvør á Torkilsheyggi eru ein. Og í summum sangum er tað samanspælið ímillum hesar bólkar, sum er berandi, tá teir til dømis svara hvørjum øðrum við at taka upp aftur frá hvørjum øðrum. Men Salt er á ongan hátt einfalt, og beint sum tú heldur teg hava funnið onkran tráð, so koma onnur mynstur fram. Tey eru nýskapandi innan føroyskan tónleik. Fleiri teirra hava sungið í kórum fyrr - enntá í Siloakórinum - og summi gera so enn. Og tey bera sínar royndir við sær t.d. haðani. Tey kunnu kanska samanlíknast nakað við aðrar a cappella bólkar í Føroyum, men tey fara inn á heilt aðrar gøtur og mugu sigast at vera eksperimenterandi á sín hátt.Tey syngja lænt tilfar á enskum og føroyskum og traditionelt, kent og minni kent tilfar. Men tey gera egnar útgávur burturúr tí, antin við at broyta eitt sindur ella við at gera nýtt heilt frá grundini. Og hesar útgávur víkja frá tí vanliga, við at tær eru bygdar upp av áhaldandi variatiónum av ræddarsamanseting og av harmonium - heilt til ovfarni. Okkurt lag er lagatyssi av gomlum ungdómskórum, eitt annað av gomlum sálmum og Negro Spirituals.

Skrá teirra var:
Halleluja
**Praise Him/Komið tosið um Jesus**
**Fjart út um himmalhválvið** (Augusta Lonberg, Z. Zachariassen føroyskaði)

**My Jesus I Love Thee** (William R. Featherstone, canada. V. Danielsen føroyskaði)

**On Jordans Stormy Banks/Shall We Gather at the River/Down by the Riverside**
Har áin er tað savnandi elementið

**Eg vil mínum Harra prísa** (Gomul donsk Mariuvísa, Hans Thomissøn, 1569. J. Dahl týddi. Sungin við gomlum før. sálmalagi)

**We got to Sing**

**Á náði, sum ei sleppir mær** (George Matheson, skoti. V. Danielsen føroyskaði)

**Gentle Sheperd**

**Oh Jesus from danger your name will protect me** (Á *Jesus, títt navn er í vanda eitt virki* eftir Linu Sandell, V. Danielsen føroyskaði, Gudmundur Johannesen umsetti til enskt)

Heildarmyndin eg havi av SALT er nakað listarligt, meditativt. Tað er avbjóðandi fyri áhoyraran, samstundis sum tað nærmast masserar hoyrn og kenslur. Serliga eftir *Oh Jesus from danger..* hugsaði eg um ein lítlan løk og tað tutl, vit øll kenna frá einum friðarligum summarkvøldi. Og um vit halda okkum til myndina, so syngja tey so reint sum tað reinasta kelduvatn. Tey megna sera væl at teingja ljóðligu heildina til innihaldið. Frá tí inniliga og eyðmjúka í bønarsanginum *Fjart út um himmalhválvið,* til tað lívliga og spælandi í *We got to Sing.*

Tey sjey eru øll stinnir sangarar, við hvør sínum eyðkennum og sterku síðum, sum jú skapir hesa góðu heild. Og tey skiftast alla tíðina sínamillum til at syngja tað berandi lagið, so at solo, duett og trio av øllum slagi er flættað inn í tann grundleggjandi trí- til seksræddaða sangin. Unisonbrotini eru eisini so reint og vakurt sungin.

SALT fer at taka fløgu upp í nærmastu døgum, so tað verður spennandi at hoyra tað nýggja og møguliga egna tilfar, tey velja at geva út.

Eftir er bara at leggja afturat, at konsertirnar vóru góðar upplivingar á allan hátt.


## Aðalfundur við fyrilestri "DONG á djúpum vatni"

**Vit bjóða til aðalfund 2. juni 2004 kl. 19.00 á Hotel Føroyum**

*Jan Terje Edvardsen, Senior Vice President, Exploration hjá DONG hevur framløgu.*

**Fundarskrá**

Kl. 19.00 Vælkomin
Kl. 19.30 Formaðurin setur Oljutingið
Kl. 19.35 Aðalfundur
1. Val av fundarstjóra
2. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári
3. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar
4. Val av nevnd
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt.
Kl. 20.00 Jan Terje Edvardsen, Senior Vice President, Exploration, leggur fram um teirra strategi og vánir til Atlantsmótið.
Kl. 20.40 Spurningar frá áhoyrarum
Kl. 20.50 Matur og drekka

***DONG stuðlar tiltakinum.***

Vinarliga boða Vinnuhúsinum frá luttøku á telefon 311864 ella umvegis teldupost: industry@industry.fo.

*Vælkomin*

Vinarliga
Oljutingið

OLJUTINGIÐ




# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Liz og Ragnar Niclasen:

## Trúboðarar á Filipsoyggjunum í 25 ár

**Í apríl 2004 vóru liðin 25 ár síðan klaksvíkingurin Ragnar Niclasen og konan, Liz, byrjaðu sum trúboðarar hjá New Tribes Mission á Filipsoyggjunum. Í august verða 30 ár síðan Ragnar flutti úr Føroyum**



*Ragnar og Liz Niclasen hava virkað sum trúboðarar á Filipsoyggjunum í 25 ár*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Ragnar Niclasen, sum í dag er 51 ára gamal, er føddur og uppvaksin í Klaksvík, sonur Elly og Eivind Niclasen.

Liðugur við skúlan var hann tveir túrar við trolaranum Vesturvón, síðan arbeiddi hann á heilsøluni hjá Kjølbro í umleið 4 ár.

Hesa tíðina var hann eisini sunnudagsskúlalærari í samkomuni í Betesda. Hetta dámdi honum sera væl, og hann fekk hug at útbúgva seg meira innan hetta øki og slapp inn á ein bíbliuskúla hjá New Tribes Mission í Wisconsin í USA. Hann fór á skúlan við tí í hyggju at byrja aftur sum sunnudagsskúlalærari, tá hann kom heim aftur til Føroyar.

Skúlin byrjaði í august 1974. Tá Ragnar skuldi í summarfrí í 1975, sá hann eina lýsing á skúlanum, har søkt var eftir fólki at hjálpa til at byggja eini hús hjá einum trúboðara í Bolivia. Hann helt, at hetta ljóðaði sera áhugavert, og slíkan møguleika fekk hann ivaleyst ikki aftur, so hann fór til Bolivia og var har í átta vikur.

Meðan hann var í Bolivia, fekk hann møguleika at vitja tann ættarbólkin, sum í 1942 drap teir fyrstu trúboðararnar hjá New Tribes Mission. Hann vitjaði eina samkomu í hesum ættarbólkinum, og tá hann sá stóru broytingina, sum var farin fram har – góð 30 ár eftir at trúboðararnir vóru dripnir - gjørdi hann av, at tað var eina slíka uppgávu, hann vildi brúka lív sítt til.

Ragnar gjørdi seg síðan lidnan við skúlan í USA og kom heim aftur til Føroya á jólum í 1975. Í januar 1976 fór hann á ein venjingarskúla fyri trúboðarar í Ontario í Kanada. Har møtti hann Liz, sum er úr Nova Scotia í Kanada, hon var har í somu ørindum sum hann. Tey blivu trúlovað og giftust á heysti 1976 og vórðu liðug við skúlan á vári 1978.

### Til Filipsoyggjarnar

Í apríl 1979 vórðu Ragnar og Liz send sum trúboðarar hjá New Tribes Mission til ein ættarbólk í Norðurfilipsoyggjunum, har tey vóru í 11 ár. Har eru í dag tvær samkomur við tilsamans 70 fólkum í tveimum ymiskum bygdum við tilsamans 1200 íbúgvum.

Síðan 1992 hava Liz og Ragnar arbeitt á skrivstovuni hjá felagsskapinum í miðbýnum í høvuðsstaðnum Manila, har tey hava havt ábyrgdina av at umsita tað, sum myndugleikarnir krevja, fyri at trúboðararnir kunnu virka í landinum.

Í februar í ár fluttu tey til eina bygd 250 km norðan fyri Manila, har tey hava ábyrgdina av upplýsing og kunning til trúboðarar, sum eru farnir til aðrar ættarbólkar á Filipsoyggjunum, ið enn ikki hava hoyrt gleðiboðskapin.

Ragnar og Liz eiga tveir dreingir, sum báðir eru húsasmiðir: Ryan, sum er 25 ára gamal, hann hevur konu úr USA, tey búgva við Niagarafossin. Graig, sum er 23 ára gamal, hann giftist 3. apríl 2004 og býr í Birmingham í Onglandi.

Ragnar sigur, at tey hava upplivað nógv ymiskt hesi árini á Filipsoyggjunum sum t.d. jarðskjálvta, statskvett, eldgos, og sín besta vin tiknan sum gísla, men teirra størsta gleði er at síggja fólk í ættarbólkunum koma til trúgv og tær broytingar, ið tað førir við sær.

Lis og Ragnar Niclasen hava vitjað í Føroyum síðan 19. apríl, og fríggjadagin 4. juni gongur leiðin aftur til Filipsoyggjarnar.

Hannelena Mittún Jacobsen, Tórshavn:

## Stjóri og nýggjur eigari av Sp/f SetHúsaSøluni

**Týsdagin 1. juni tók Hannelena Mittún Jacobsen við sum nýggjur stjóri og eigari í Sp/f SetHúsaSøluni í Havn. Hannelena hevur í mong ár arbeitt sum bankakvinna og hevur tí drúgvar royndi við húsafígging**




*Hannelena Mittún Jacobsen er nýggjur stjóri og eigari av Sp/f SetHúsaSøluni í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Helgi Brekku, fyrrverandi bankamaður í Havn, stovnaði Sp/f SetHúsaSøluna fyri seks árum síðan, og hevur hann rikið fyritøkuna til 1. juni 2004, tá Hannelena Mittún Jacobsen tók við sum nýggjur stjóri og eigari av fyritøkuni.

Hannelena er ættað av Selatrað. Hon er útbúgvin bankakvinna og fór í bankalæru í Handelsbanken (nú Danske Bank) í Keypmannahavn í 1966.

Í 1975 byrjaði hon í Sjóvinnubankanum í Havn 1975 og síðan 1994 í samanlagda bankanum, Føroya Banka. Hon kennir tí allar mannagongdir innan fígging og hevur eisini drúgvar royndir við húsafígging.

Hannelena er gift við Høgna Jacobsen úr Havn, og tey eiga tvey børn: Annika og Ingi. Eisini eiga tey 3 ommu- og abbabørn.

Fríggjadagin 4. juni frá kl. 15-17 verður móttøka á SetHúsaSøluni í sambandi við eigaraskifti.

### Gullbrúdleyp á floti

Í dag kunna Hallgerð og Knút Nolsøe halda gullbrúdleyp.
Dagurin verður hildin saman við familjuni umborð á Norðlýsinum og Norrönu.

Minningarorð um klassakammerat mín

## Leon Gunnar Johannesen

**14. november 1988 22. mars 2004**



Góði, elskaði Leon Gunnar.

Bert fáar tímar áðrenn vanlukkan hendi, stóðu vit í skúlagarðinum og tosaðu. Vit vóru glað og í góðum lag og væntaðu sum altíð at møtast aftur um kvøldið. Men tá so eg kom til hús, fekk eg tey tungu boðini um, at ein vanlukka var hend á Sevmýri, sum tíverri kravdi títt lív. Hesi boðini vóru so óverulig og syrgilig, og tankin um ongantíð at verða í tínum selskapi meira er óberandi.

Tú og eg, Leon Gunnar, hava verið ígjøgnum nógv gott saman. Vit blivu bæði doypt og konfirmerað saman í Bønhúsinum í Øravík, vit hava gingið í klassa saman í Tvøroyrar skúla og eisini hava vit spælt saman sum lítil.

Eg fari altíð at minnast teg sum ein fittan, smílandi, gávumildan og sjarmerandi persón. Tað er ikki tað sama at koma inn í klassastovuna í dag, nú tú ikki er har longur. Tómrúmið er ómetaliga stórt og plássið hjá tær kann ongantíð fyllast upp aftur.

Góði Leon Gunnar, takk fyri alt tú hevur verið fyri meg og takk fyri tíðina, vit hava havt saman. Vit síggjast einaferð aftur. Jesus pápin veri hjá tær og Jesus pápin veri hjá Irdi, Teddy, Angilie og teimum, ið eftir sita.

Hvíl í friði, elskaði Leon Gunnar.

**Petra Christiansen**

### Dagurin

**2. juni. Marcellinus**, prestur í Róm, sum varð hálshøgdur umleið ár 300.


## Móttøka

Í samband við at Jákup Frants Larsen býráðsskrivari hevur verið í starvi hjá Fuglafjarðar kommunu í 30 ár, verður skipað fyri almennari móttøku í býráðshúsinum

**Fríggjadagin 4. juni 2004 - kl. 15.00 - 18.00**

**Fuglafjarðar býráð**